# Suðuroyingar skulu hava fleiri møguleikar

**-Tað kann ikki góðtakast, at landsins myndugleikar geva suðuroyingum boð um, at antin taka teir av hesari loysnini til tunnil ímillum Øravík og Hov, ella dettur alt niðurfyri, sigur Petur Hammer, byggimeistari á Tvøroyri**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*



*Suðuroyingar eiga ikki at góðtaka at ein loysn verður kroyst niðuryvir okkum, sum ikki er nøktandi og tí eiga vit at kanna allar møguleikar, sigur Petur Hammer, sum av sínum eingtingum setti seg í sambandi við NCC í sambandi við Hovstunnilin. Her vísir hann okkum kortið við báðum linjuføringunum á*

**Suðuroy:** Tað var Petur Hammer, byggimeistari á Tvøroyri, sum av sínum eintingum vendi sær til NCC at fáa teir at meta um ætlanina at byggja tunnil ímillum Øravík og Hov og sum vit hava greitt frá omanfyri.

Vit hava spurt hann, hvussu tað bar til, at hann, sum vanligur borgari, tók eitt so óvanligt stig.

Hann sigur, at tað er ongin loyna, at nógvir suðuroyingar hava havt ilt av linjuføringini, sum Landsverkfrøðingurin hevur lagt, tí hildið verður, at tunnilin liggur alt ov ovaliga.

Eftir uppskotinum hjá Landsverkfrøðinginum, fer tunnilin inn sunnanfyri Tjaldavík og kemur út aftur nakað væl uppi á Hovsegg. Hetta uppskotið fer at føra við sær, at tað verður neyðugt at gera yvir fýra kilometrar av nýggjum vegi í sambandi við tunnilin og tað fer eisini at føra við sær, at suðuroyingar bert í avmarkaðan mun sleppa undan tí, sum ætlanin var, at tunnilin skuldi bjarga teimum undan: Tí vandamikla fjallavegnum báðu megin Hovsegg.

- Men tað, sum gjørdi endaliga útslagið, var, tá ið eg hoyrdi, at Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur gjørt av, at gera tunnil undir Leirvíksbygd í sambandi við Undirsjóvartunnilin.

- Hetta haldi eg eisini var tann rætta loysnin. Men hetta var ein loysn, sum varð góðtikin, uttan nakað hóvasták, hóast hon kostar 27 milliónir, minnist meg rætt.

Samstundis ljóðaði ímillum manna, at bý- og bygdaráðspolitikarar úr Suðuroy fingu greitt, at vita, at loysnin, sum Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp, var einasta loysnin, sum kundi koma uppá tal til ein tunnil ímillum Øravík og Hov.

## Ein nógv betri loysn

Petur Hammer sigur, at hetta kundi hann, sum suðuroyingur als ikki góðtakast, serliga tá ið hugsa verður um ónøgdina, sum hevur verið við ætlaðu linjuføringina hjá Landsverkfrøðinginum.

Hann sigur, at NCC hevur framt eitt tekniskt bragd í sambandi við Vágatunn-ilin og tískil setti hann seg av sínum eintingum í samband við felagið og legði málið fyri teir.

Teir hava síðani kannað málið og tað tilfar, sum, er til taks og gjørt sínar útrokningar.

- Úrslitið, sum NCC er komið til, er so mikið spennandi, at tað má avgjørt takast við í metingunum, sigur Petur Hammer.

Hann sigur, at ongin ivi er um, at linjuføringin, sum NCC hevur stungið út í kortið, er nógv betri enn tann, sum Landsverkfrøðingurin hevur valt.

Tunnilin kemur at liggja nógv lægri. Hon verður sera orkusparandi, tí nú sleppa bilar undan at sleipa seg niðan á hálva Hovsegg, samstundis sum bæði SEV og telefonverkið kunnu leggja kaðalar ígjøgnum handa, heldur enn at fara upp í fjøllini. Og so fer tað eisini at gera ætlaðu samferðsluhavnina í Trongisvági einar 15 milliónir bíligari.

Petur Hammer sigur, at hansara vón er, at suðuroyingar standa sum ein maður í hesum máli og ikki góðtaka, at landsins myndugleikar sleppa at kroysta eina loysn niðuryvir okkum, sum ikki er nøktandi.

Men framum alt vónar hann, at politikarar úr øllum flokkum standa saman og ikki gera hetta málið til eina partapolitiska kastibløku.

# Fyrireikingar til yvirgang

**Yvirmenn í Sambandsherinum hava hesa síðstu vikuna ráðgivið fólki í USA, um hvussu tey skulu bera seg at, um yvirgangsatsóknir skuldu komið, nú kríggið við Irak nærkast**

YVIRGANGSRÁÐGEVING
*Annika S. Olsen*

USA hevur fingið hóttanir um yvirgangsálop tær síðstu vikurnar. Tí eru heryvirmenn og onnur køn fólk farin undir at greiða frá, hvussu fólk í USA kunnu fyrireika seg, um nú yvirgangsatsóknir ella líknandi skuldu tikið seg upp. Serliga er tað yvirgangsbólkurin hjá Osama Bin Laden, al Queda, amerikumenn eru bangnir fyri. Tað er ikki víst, um al Queda hevur kjarnorkuvápn, men tey serkønu eru vís í, at yvirgangsbólkurin hevur evnafrøðilig, lívfrøðilig og geislavirkin vápn.

Tey serkønu ávara ímóti yvirgangsálopum, men ringt er at siga, júst hvat er í væntu. Tá, ella um Irakkríggið byrjar, kunnu amerikanarar verða raktir av øllum frá sjálvmorðsatsóknum, skjótiálopum og politiskum morðum til burturflytanir av fólki.

## Fyrireikingarnar

Tey serkønu ráða fólki til at fyrireika seg sálarliga upp á møgulig álop og aðrar trupulleikar, og eisini skulu tey syrgja fyri at hava alt, sum tørvur er á undir slíkum umstøðum.

Fyrst og fremst siga tey serkønu, at best er, um hvørt heim hevur nóg mikið av mati og vatni í tríggjar dagar. Harafturat ráða tey fólki til at gera avtalur við familju og kenningar, soleiðis at tey kunnu fáa samband við hvønn annan, um neyðstøða verður. Hetta kunnu tey til dømis gera við at finna ein triðja part, sum kann taka ímóti øllum boðum. Tey serkønu siga eisini, at øll mugu eiga sterkt tape og stórar plastposar ella plastteppir heima, fyri at verja seg ímóti møguligum álopum. Afturat tí skulu øll heim eisini hava saksar, dósaopnarar, teppir, lummalyktir, útvørp og battarí.

## Bygningar og trygd

Sum vit jú kenna aftur frá 11. septembur 2001 eru bygningar vælumtóktir sum yvirgangsmál. Tað amerikanska fólkið hevur fingið at vita, at nakrir bygningar fara at vera truplari at koma inn í av trygdarligum áðum, men tað mesta innan hetta fer at vera loyniligt arbeiði hjá eftirlitsfólki, og fer tann vanligi amerikanarin tí ikki at leggja stórvegis merki til nakað.

Nýggjar reglur skulu gerast viðvíkjandi vitjanum í høgum bygningum, og arbeiðararnir, ið avlevera vørur, skulu hava góðkenning, áðrenn farið verður inn. Stórir bygningar skulu eisini hava luftskipanina kannaða.

Sølumiðstøðir hava fingið boð um at flyta parkeringsplássini, serstakliga har lastbilarnir parkera, eitt sindur burtur frá sølumiðstøðini. Nógvar sølumiðstøðir hava harafturat sett vápnaðar vaktir í starv.

## Amerikanarar ræddir

Amerikanarar eru sera ørkymlaðir, nú teir fáa øll hesi ráðini, tí tey virka jú sera álvarsom. Men amerikanskir heryvirmenn vilja fyrst og fremst hava hesar upplýsingarnar út til fólki sum eitt “betur fyrivarin, enn eftirsnarin”-tiltak. Tað varð eisini nógv funnist at, tá trygdar heryvirmenn eftir 11. september 2001 komu við nógvum ávaringum, men ikki greiddu fólkinum frá, hvussu tey kundu gera nakað, og hetta er ein onnur orsøk til fyrireikingarnar nú.

Harafturat hongur tað saman á tann hátt, at al Queda ikki eru líka so áhugaðir at leypa á, um amerikanska fólkið hevur vant seg við tankan um álop. Eisini leypa teir ikki á støð, sum teir vita eru væl tryggjað. Tað vil siga, at um USA er meira fyrireikað, missir al Queda meira og meira áhugan fyri at leypa á, halda serfrøðingarnir.

Serfrøðingarnir halda tað eisini vera sera týdningarmikið at fólkið fyriheldur seg róliga og at tey ikki øsa seg upp. Meiningin er ikki at ræða fólk, men bert geva kunning, sigur ein granskari. Tey serkønu siga, at um støðan verður sera ring, skulu fólk lurta eftir tíðindunum. Um boðini eru, at øll skulu vera við hús, so mugu fólk ikki fara út, tí vegirnir høvdu kortini verið sperraðir.

Alíkavæl eru amerikanarar ræddir. Teir siga seg nú veruliga kenna, at kríggj er í nánd, og tað ger teir bangnar.



# Ein býarmynd fer í søguna

**Tos er í býnum um, at tað møguliga verður skrivað »stongt« á hurðina hjá Kondittarínum í næstum. Eitt av starvsfólkunum á kondittarínum, hevur váttað, at tær, sum nú arbeiða har, fara at gevast**

Býarmynd
Ingrid Bjarnastein



*Konditaríið ein hósmorgun. Um tosið og slatrið er satt, so verður onki konditarí meira*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

»... ein túr inn á konditaríið, og siti so fitt har og bíði...«. Soleiðis syngur Margretha í sanginum »Eg eri so spent til jóla«. Men nú verður kanska ikki møguligt hjá teimum, sum plaga at ganga inn á konditaríið í miðbýnum í Havn, at sessast til eitt prát og ein kaffimunn longur. Tað er nevniliga komið upp á tal, at konditaríið skal snara lyklinum.

Eitt av starvsfólkunum á konditarínum hevur váttað, at tær, sum reka konditaríið í løtuni, helst fara at gevast, men hvat verður í framtíðini, visti hon ikki at siga. Kanska onkur annar tekur yvir ella letur tað heilt aftur.

## Apríl søga

Konditaríið er vorðið til eina býarmynd í Havn. Tað er har tú kanst fara innar ein kaldan vetrardag til ein kopp av kaffi ella kakao, og har er eitt heilt serligt umhvørvið.

Tá Sosialurin leitaði sær inn á konditaríið hósmorgunin var umhvørvið soleiðis, sum tað altíð er. Kaffiroykur út í gongina, prát, látur, koppar, sum verða settir niður á borðið hoyrdist beinanvegin komið var innar í gongina.

Við diskin arbeiða tvær kvinnur. Tær eru ikki serliga tíðindafróðar, men tað eru teir føstu og fúsu kundarnir, sum sita yviri við tað fyrsta borðið. Tað fasta borðið. Teir somu menninir, sum hava gingið inn í konditaríið ár eftir ár.

– Vit hava hitst her, hvønn morgun í 25 ár. Onkur eisini meira, sigur tann eini.

Hvønn morgun klokkan 9, tá Konditaríið letur upp, sessast teir við borðið við kaffikoppi og rundstykki.

– Vit hopa, at hetta er ein apríl søga. Tað ber ikki til, at konditaríið skal latast aftur. Okkurt má gerast, siga teir til slaturin um, at konditaríið nú helst fer í søguna.

## Hugnaligt

Inni á Konditarínum er hugnaligt. Tað fyllist skjótt við fólki, sjálvt um klokkan ikki meira enn farin er av níggju henda hósmorgun.

Við borðini, tey borðini, teir altíð sita við, sita eini 12 mans í morgun. Allir hava hvør sín kaffikopp. Nakrir lesa bløðini, meðan aðrir sita og práta.

– Vit sita her og práta um alt møguligt. Loysa verðinstrupulleikar og fótbóltsprát er tað mesta, sigur ein, meðan hinir grína og siga, at tað er ikki bara fótbóltsprát.

– Vit prátað um tað, sum er farið og tað sum kemur, vil ein annar vera við.

Nú kemur ein við einum kaffikoppi og einum borðiski við einum rundstykki afturat.

– Hetta hevur ógvuliga nógv at siga fyri okkum sosialt. Hetta er byrjanin upp á ein góðan dag. Hugnaligt er tað eisini. Vit eru her hvønn morgun, eisini leygarmorgun.

Nakrir trúgvir kundar plaga at sita yviri í horninum. Teir koma eitt sindur seinni enn teir, sum sita við fyrsta borðið.

– Vit eru eini 12-20 mans, sum plaga at hittast. Allir havnarmenn, sigur ein, sum situr í horninum, meðan ein leggur skemtingarsamt afturat, at talan er bert um reint blóð, og so flenna allir hinir so hjartaliga.

– Tá vit skulu hava meira kaffi, so gera vit soleiðis, verður greitt frá. Hann ristir við lokinum til mjólkarílætið, og so kemur meira kaffi á borðið.

Nógvar góðar søgur eru úr konditarínum, og teir trúgvu, góðu og gomlu kundarnir eru vísir í, at tað verður ein stórur missur, um konditaríið snarar lyklinum fyri seinastu ferð.

# Rás Tórshavn í Býráðið

**Borgarar í Tórshavnar Kommunu gera nú vart við sína ónøgd, og vilja hava Rás Tórshavn aftur at senda. Undirskriftir verða savnaðar saman í býnum, sum skulu handast býráðnum í næstum. Jógvan Arge, býráðslimur, fer nú at reisa málið á býráðsfundi komandi hósdag**

RÁS TÓRSHAVN
*Ingrid Bjarnastein*



*Jógvan Arge vil hava Rás Tórshavn aftur at senda. Býráðið skal gjalda tað, ið tað kostar at fáa rásina aftur at senda*

Ónøgdir borgarar gera nú vart við seg. Teir vilja hava Rás Tórshavn at senda aftur, og liggja nú seðlar úti í handlum kring býin, har fólk, ið vilja gera vart við sína ónøgd kunnu skriva undir uppá, at tey vilja hava Rás Tórshavn at aftur í kassan.

Jógvan Arge var ein av teimum, sum var ímóti, at Rás Tórshavn varð tikin frá borgarunum í kommununi, og fer hann nú at reisa málið í býráðnum.

– Eg haldi, at tað er áhugavert, at fólk nú gera vart við sína ónøgd, og tað er neyðugt av býráðnum at taka málið uppaftur, sigur Jógvan Arge, sum komandi hósdag á býráðsfundi skjýtur upp, at Rás Tórshavn verður endurstovnað skjótast gjørligt.

Jógvan Arge heldurikki, at tíðin er komin frá ókeypis tænastum, og heldur hann, at henda tænastan er ein góð kommunal tænasta, og á heimasíðuni ger hann greitt, at hann heldur, at Rás Tórshavn skal senda aftur skjótast gjørligt, og rokningina skal kommunan gjalda.

# Sjáldsamur fiskur á føroyskum sjógvi

**Fiskirannsóknarstovan hevur fingið sendandi ein sera sjáldsaman fisk. Hetta er fyrstu ferð, sum Fiskirannsóknarstovan veit um, at hesin fiskur, sum hevur fingið navnið Sankta Pætursfiskur, er fingin á føroyskum sjógvi**

FISKASLAG
*Ingrid Bjarnastein*

Ein sjáldsamur fiskur er komin Fiskirannsóknarstovuni í hendi. Talan er um ein fisk, sum hevur fingið heitið Sankta Pætursfiskur, og er hann ongantíð sæddur á føroyskum sjógvi fyrr.

Sendari av fiskinum er Dánjal Jóhan Lisberg úr Sumba. Fiskurin varð veiddur av ísfiskatrolanum, Akraborg, tann 11 august 2001, men av tí hann var kruvdur, so var ikki møguligt at síggja, hvat hann hevði etið. Talan var tó um ein kvennfisk við hvílandi rognum, sum var 39 cm til longdar, og tá hann var kruvdur vigaði hann 910 gramm.

Vísindaliga heitið á Sankta Pætursfiski er Zeus faber, og á ørðum tungumálum eitur hann Saint-Pierre, Pesce San Pietro, peixe-galo.

Sum sagt, so er hetta fiskaslagið ikki sæð á føroyskum sjógvi fyrr. Hann verður tó veiddur út fyri strendurnar á Afrika og Vestur Evropa og norður til Suðurnoreg. Eisini er hann at síggja í Miðjarahavinum og í sunnara parti av Svartahavinum.

Sankta Pætursfiskur svimur stakur ella í smáum torvum á 50 til 150 metra dýpi, og viðhvørt niður á einar 400 metrar.

Nýggja fiskaslagið er eyðkent í útsjónd. Hann er hávaksin og smalur, høvdið stórt og kjafturin kann skjótast langt frameftir, tá hann tekur føði. Teinarnir, serliga í ryggfjøðurini, eru langir. Liturin er ymiskur, mest blankt silvurlittur og heldur myrkari á rygginum enn á búkinum, harliturin ofta skyggir grønt.

Gýtingin er við Suðurongland í juni-august, og í Miðjarðarhavinum í marsmei.

Fiskurin er ein glúpskur ránsfiskur, ið livir mest av fiskasløgum sum sardin, sild og brislingi, men eisini av hægguslokki og ymiskum krabbadýrum.

Sankta Pætursfiskur hevur stóran týdning, sum hjáveiða í trol- og línufiskiskapi í Miðjarðahavinum og við vesturstrondina á Afrika, og hann sigst vera sera vælsmakkandi.